# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Dora Nielsen 95 ár

Í morgin, mikudagin 30. august, verður Dora Nielsen í Vatnsoyrum 95 ár. Dora er framvegis frísk og hevur áræði at taka lut í tí, sum fer fram kring hana, og hon býr framvegis í heiminum í Vatnsoyrum, sum hon og maðurin bygdu fyri knappliga seksti árum síðani.

Dora er ættað úr Leirvík. Foreldrini vóru Kristianna fødd Hansen og ættað av Kinn í Lamba og Johannes Johannesen, skipari og keypmaður í Leirvík. Børnini hjá teimum vóru Georg, sum var handilsmaður í Leirvík, Andrea Hansen í Søldarfirði, Dora, Hanna Eliassen í Leirvík og Kristian. Nú er Dora einsamøll eftir á lívi.

Kristianna, sum hevði lært til lærarinnu og arbeiddi í nøkur ár, doyði av sjúku longu í 1922 bert 46 ára gomul. Dora var tá ellivu ára gomul.

Kristian doyði á sumri í 1941. Við Kristiannu, sum var annað av skipunum hjá pápanum, vóru teir á veg til Bretlands at selja, tá ið einki hoyrdist aftur til teirra. Pápin, Jóannes, sum annars var lagstur upp fleiri ár frammanundan, var eisini við henda túrin.

Dora hevur verið eitt konubrot. Barnaheimið var eyðkent av nógvum lívi og virksemi. Har vóru fyrstu setningarnar settir henni at útinna í handlinum og fiskaarbeiðnum. Hon hevur arbeitt nógv alla sína tíð, og tað hevur ligið væl fyri.

Sum ung genta var Dora hjá Haraldsen í Fuglafirði, í húsplássi í Jyllandi 1930-1932, í húsplássi hjá læknanum í Vestmanna, hjá Jóhannesi úr Hvalvík í Klaksvík og í húsplássi í Charlottenlund nakrar mánaðir í 1938.

22. oktober í 1938 giftist Dora Dániali Nielsen úr Vatnsoyrum, sum hon hevði hitt í Vestmanna. Tey búsettust í Klaksvík, har Dánial hevði lært til



skipstimbrara hjá Kjølbro. Undir krígnum flutti Dánial út á Skála at arbeiða á skipasmiðjuni, sum Kjølbro átti. Tá búðu tey á Skála. Tað var tá, at Dánial fór at arbeiða sum kavari. Hetta yrki hevði hann roynt frammanundan. Eitt dømi um hetta var, tá ið hann í 1933 var við at fáa motorin úr Hannu, deksbáti hjá verfaðirinum, ið lá sokkin á Buginum í Leirvík.

Eftir kríggið fluttu tey bæði vestur í Vatnsoyrar, sum eingilsktmenninir høvdu havt fyri seg sjálvar krígsárini. Í 1948 fluttu Dora og Dánial í teirra egnu hús, og har býr Dora framvegis. Dánial doyði í 1994. Tey eiga fýra børn: Kirstin (1939), Karl Johan (1942), Jórun (1945) og Marjun (1947). Kirstin, sum er gift Hans Elmari Poulsen frá Ljósá, býr í Vatnsoyrum, Karl Johan, sum er giftur Lydiu Thomsen úr Keypmannahavn, býr í Vatnsoyrum, Jórun, sum var gift Finni Lómstein úr Gøtu, býr í Havn. Finnur doyði í 2003. Marjun, sum er gift Charles Fríðberg úr Fuglafirði, býr á Argjum. Dora eigur 17 ommubørn og 45 langommubørn.

Lívið og heimið hjá Doru og Dánial hevur verið eyðkent av gudsótta, arbeiðssemi og gestablídni. Dorusa partur lá ikki eftir. Tey fyrru árini høvdu tey eina og við hvørt tvær kýr, ungneyt og høsn. Dora hevði gott hegni. Hon seymaði og bant til familjuna, og í fleiri ár seymaði hon madrassur – serliga til skipsmenn.

Tíðliga í tíðini fór hon at handla. Fyrstu árini var sølubúðin í aðrari stovuni. Seinni flutti handilin í kjallaran, har tey frammanundan turkaðu fisk.

At búgva í Vatnsoyrum var ikki altíð so høgligt. Dánial fekk sær tíðliga bil. Hesin stóð í túninum, tá ið Dánial var aðra staðni og arbeiddi. Men tað gjørdi hann ikki so leingi. Dora mundi vera ein tann fyrsta kvinnan, sum fekk sær koyrikort. Tað var í 1947.

Saman við manninum var Dora trúføst í samkomuni Kedron í Sørvági. Síðani 1967 hevur Zarepta verið í Vatnsoyrum. Brynleif Hansen, sáli, átti hugskotið og var undangongumaður. Dánial stóð fyri byggingini, og Dora stuðlaði honum væl. Doru hevur dámt væl í Zarepta, tá ið bíbliuskeiðið hevur verið.

Dora fylgir væl við, hvussu tað gongst familjuni og í samfelagnum annars. Okkurt ellisbreðgið hevur hon. Men stokkarnir ganga framvegis. Tvær ferðir um vikuna vitjar hon í dagtilhaldinum á Ellisheiminum í Miðvági. Tað dámar henni stak væl.

Føðingardagin, sum er í morgin, verður Dora at hitta á Hotel Vágum frá klokkan 17 til 21.

**J**

✝

## Andlát og jarðarferðir

Í sambandi við, at kistan við **Karl Anton Klein úr Vestmanna**, fer úr stóra kapellinum á Glostrup Sjúkrahúsi í dag 29. august klokkan 13, verður bønarhald hildið við Bergi Jacobsen. Kistan kemur við flogfarinum í kvøld klokkan 20, og fer í kirkjuna í Vestmanna. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju hósdagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Karl Anton, kunnu lata eina gávu, á konto í Føroyabanka.

**Hans Petur Djurhuus, Selatrað** andaðist í heiminum 28. august, 65 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri vinur, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Olivur Veihe Sundberg**
Rude, ættaður úr Porkeri

andaðist og varð jarðaður.

Takk til tykkum øll fyri heilsanir og til tykkum, sum ringdu, takk fyri blómur og kransar.

*Vegna tey avvarðandi*
**Elma, Naomi og Leo við familju**

## Minningarorð
## Poula Oluffa Meyer
### f. 25.02.25 - d. 06.06.06

Á palli lívsins broytast umstøður rætt sum er. Fyri stuttum var eg suðuri í Vági ein sunnudag og setti inn nýggj fyristøðufólk fyri samkomu Frelsunarhersins har.

Mánamorgun bar leiðin til Tvøroyrar. Tað var eins og tey tungu skýggini ávirkaðu lyndislag mítt. Komin undir Akurgerði fór eg inn í kirkjugarðin og stóð har við grøvina hjá Poulu Oluffu saman við manni, dóttur, syni og konu hansara.

Sorgin og saknurin var aftur veruleiki fyri okkum øll, men gott var tað henda gráveðursdag saman at biðja góðan Gud um at signa minnið eftir okkara elskuligu Poulu Oluffu. Hon var fødd í Havn 25. februar 1925. Foreldrini vóru Helena f. Debes av Oyri og Johannes Hansen (hjá Gynnu) úr Havn.

Sum ung arbeiddi hon hjá faðir sínum, men tey flestu árini í Havnini starvaðist hon í Sápuhúsinum.

Í oktober mánað 1951 giftist hon við Kaj Meyer, og tey settu búgv á Tvøroyri.

Børnini vóru trý: Herfríð ið býr í Froðba, Vilhelm ið býr í Trongisvági og Katrin ið býr í Keypmannahavn. Tey eiga 8 abba- og ommubørn.

Kaj sigldi úti í nógv ár, meðan uppgávan hjá Poulu Oluffu var at fjálga um heimið og familjuna. Hon var ein serstøk kvinna, gestablíð og hjartagóð. Hon dugdi alt og var góð at heita á. Ein hevur mangan sitið væl í teirra heimi.

Kona mín, systurin Erna, og eg hava búð í Noregi í mong ár. Altíð var tað hugnaligt og hugaligt at fáa vitjan av hjúnunum. Mangar góðar løtur minnast vit aftur á.

Vit ið kendu Poulu Oluffu vita, at heilsan ikki var hin besta. Mong vóru tíverri árini hon stríddist við sjúku. Nú sjúkan rættiliga fór at gera um seg, hevur Kaj verið trúfastur, hjálpt og fjálga um hana.

Teir síðstu 11 mánaðir hevur hon verið á Ellisheiminum. Felagar mínir úr Frelsunarherinum í Vági vóru javnan og høvdu andakt har. Ein teirra segði mær at Poula Oluffa við skelvandi og veiku rødd síni segði:"Jesus er hin besti og trúfasti vinur eg eigi, og nú fari eg skjótt heim til Hann!"

Týskvøldið 6. juni var lívsskeiðið at enda komið. Øll familjan var um hana.

Sjálv takkaði hon teimum fyri, at tey høvdu verið so góð við hana. Nú var hon reiðubúgvin og stutt eftir andaðist hon.

Sálamo skrivar so vakurt um skilnaðarstundina:" Silvurtráðurin slitnar og menniskjan fer til teir ævigu bústaðir. Dustið fer aftur í moldina og verður som tað var áður, men andin fer aftur til Gud ið gav hann."

Nú Poula Oluffa er farin, drýpa vit hjúnuni høvur í takksemi. Fyri konuna var hon ein góð systir, og vit bæði takka fyri tað hon var fyri okkum.

Gud vælsigni minnið og alla familjuna.

**Erna og Njál**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á silvurbrúdleypsdegnum takka vit hjartaliga.

**Hjørdis og Edmund, Hirtshals**

**Dagurin í morgin**
**30. august. Benjamin.** Dagsins navn sipar til yngsta son Jákups við Rakul, (1. Mós. 35,18). Navnið merkir eydnusonur.